Jørn Larsen á ST-skrivstovuni í Danmark

Samvinna við Namibia máar grundarlagið undan ST-samtyktum

Í hesum døgum taka føroyskir vinnulívsmenn og umboð fólkafloksins á fólkatingi saman lógvatak við suðurafrikonsku hersetingarstjórnina í Namibia við vónini um, at samvinna kann koma í lag millum Føroyar og Namibia.

Sambært málgagni fólkafloksins í gjár er ætlanin at fáa í lag samvinnu við Namibia, soleiðis at føroysk skip sleppa at fiska í sjónum út fyri Namibia, og harafturat eru namibiarar sera hugaðir at gera joint venture avtalur við føroyingar.

Teir triggir føroyingarnir, sum eru í Namibia, eru Osmund Justinussen, formaður í Reiðarafelagnum, Eiler Jacobsen, reiðari, og Óli Breckmann, løgtingsmaður og fólkatingsmaður.

Tað er als einki loyndarmál, at Namibia í nógv ár hevur verið ólógliga hersett av Suðurafrika. M.a. kann nevnast, at suðurafrikonsku apartheid- og verjulógirnar eru settar í verk í Namibia. Í dag hevur Namibia umboð bæði í kongressini og senatinum í Suðurafrika.


Jørn Larsen, sum starvast á upplýsingartænastuni hjá ST í Keypmannahavn, sigur við Sosialin, at ST-felagsskapurin fleiri ferðir hevur samtykt, at Suðurafrika skal taka seg úr Namibia, men hesum hevur hvíta minniluta-stýrið í Suðurafrika ikki viljað lurtað eftir.

ST hevur ti samtykt at boykotta Namibia, sum verandi hersett av Suðurafrika og hava fleiri lond tikið hetta boykott til eftirtektar, m.a. danska fólkatingið.

Hvat viðvíkur stjórnarvaldinum í Namibia, so sigur Jørn Larsen, at tað í veruleikanum ikki finst nøkur namibisk stjórn. Talan er harafturímóti um eina viðkaða suðurafrika stjórn, sum fevnir um Namibia eisini.

— So um føroyingar sum partur av ST royna at gera samstarvsavtalur við Namibia, má hetta metast sum ein roynd at máa grundarlagið undan teimum samtyktum ST hevur gjørt, sigur Jørn Larsen at enda.

jan



DAGBLAÐIÐ

54. ÁRG. FRIGGJADAGUR 4. MARS 1988 6 KRÓNUR

Ossi, Eiler og Óli í Namibia:

Veiðuloyvi í Namibia — bjarging fyri føroyska fiskiflotan?

Fiskirkidømið hjá Namibia er ómetaligt. Fiskivinnuni tørvar know-how og namibiarar eru sera áhugaðir í at gera joint-venture-avtalur við føroyingar.

Talan er um stóra óvmarkaða kvotu av suðuratlantiskari síld (Red Eye), ein stovn av rossamakreli uppá 5 miljónir tons og ein lítla stóran stovn av hake, (heyki) eitt toskaslag.

Føroyingar kunnu gera nýtslu av mest framkomnu fiskivinnuhavn í Afrika, Walwis Bay, sum bert liggur tímar frá fiskileiðunum.

Osmund Justinussen, formaður í Føroya Reiðarafelag, Eiler Jacobsen, reiðari, og Óli Breckmann, fólkatingsmaður, eru í løtuni í Namibia, og teir skulu hava endaligan fund við stjórnarleiðaran, Moses Katjuangua, í dag.

Fyribils verður talan um royndarloyvi til tvey nótaskip, ið skulu fiska rossamakrel og avreiða í Walwis Bay, eitt í Lüderitz, ið liggur sunnari.

Harnæst verður talan um loyvi til fýra partrolarar, ið skulu fiska heyk og avreiða í Walwis Bay, umframt eitt møguligt loyvi til eitt stórt skip við frystikapasiteti.

Møguleikar eru fyri øðrum fiskiskapi eisini. Avreiðingarmøguleikarnir og tænastustøði annars á landi er í topp — og prisurin er avbera góður.

Lesið meira um samráðingarnar inni í blaðnum. ójr

Ossi, Eiler og Óli:

Hitta Katjuangua í dag

Osmund Justinussen, Eiler Jacobsen og Óli Breckmann hitta í dag namibiska stjórnarleiðaran, herraroknvaldingin Moses Katjuangua, 'saumaseddlin hitta tær ídnaðarmálaráðkarra, fiskivinnuráðharrran og namibiskar fiskifrøðingar.

Tær triggir koma ikki aftur til Føroya við endaligum undirskriftarmøguleikum, men eisini til boð og eisini uppskot, sum eitt nú Færeya Realkreditbanki og landsstýrið tenga taka støðu til. Møguleikarnir eru sera stórir, og vit fara í komandi viku at greiða nærri frá hesum samrøðum við myndafrøðingum.

Osm. Eiler og Óli hava farið eitt tilboð frá eini fyritøku í Walwis Bay, sum umsetir fyri 300 miljónir krónur og leivur 500 menn í arbeiði. Ístaðin fyri at nýta møguligu avtalu við føroyingar, ið tað vil hjálpa tvørsundi uppá fleiri tíggjur tonnir í lotuskaptingum og ovrega lokalfólki arbeiði, umframt møguleikar fyri útbúgving innan sjómannskap.

Rættingaleiðarnar viðvíkjandi Walwis Bay eru fullkomiliga greiðar, men eitt vetrargrið eksl eisini fæst frá stjórnini, sum hevur boðið teimum tímum til fundar í dag.

Tær skulu vera gamlir hjá namibiska stjórnarleiðaranum í Windhoek, Moses Katjuangua. Síðani skulu trír hitta lógarráðharrranum Andreas Shepanga. Hesir hava umboða samrøðurnar millum arbeiðskarar í Namibia, bátarei- og reepsamtøkunar. Aftan á skulu trír á fund við fiskivinnuráðharran Jan de Wet og sakkar fiskivinnuráðingar.

Í morgin fara tríggir til London, og vertandi verða trír aftur í Føroyum tann næstkomandi dag mánadagin. ójr

Løgmaður um føroyingarnar á Namibiavitjan:

Grov provokatión móti ST-samtyktum

— sum kann koma okkum aftur um brekku

— Eg eri ómetaliga betonkilig við royndirnar hjá føroyskum vinnulívsmonnum og einum løgtings- og fólkatingsumboði at fáa í lag samvinnu við Namibia, tá vit vita, at hetta land av ST er lýst verandi undir boykotti, ti tað er hersett av Suðurafrika.

Hetta sigur Atli Dam, løgmaður, í eini viðmerking til tíðindini í Dagblaðnum um, at føroyingar eru í Namibia við tí endamáli at gera samstarvsavtalur landanna millum.

Løgmaður vísir eisini á, at slíkt er brot á danskan uttanríkispolitikk, ti fólkatingið hevur jú samtykt at boykotta Suðurafrika og harvið eisini Namibia.

Atli Dam sigur víðari, at tað er als ikki neyðugt at biðja um fiskiloyvi frá Namibia, ti sjómarkið gongur bert út á 12 fjórðingar. Alt økið millum 12 og 200 fjórðingar er undir altjóða umsiting og skulu vit fiska har, so skulu vit til altjóða kommisiónina at fáa hetta loyvið.

— Tað kann so vera, at tað er gott at landa í Walvis Bay, men so má ein kanna aðrar møguleikar.

Víðari sigur Atli Dam:

— Eitt er tað, at løgtingið ikki aktivt hevur tikið undir við ST-samtyktunum, men harfrá og so til at bróta boykottið hjá londum, sum hava tikið undir við samtyktunum, tað er eitt langt lop. Tað er ein rættilig provokatión aveinum løgtingsmanni at luttaka í hesum og av einum fólkatingsmanni aktivt at medvirka til at bróta ta samtykt, sum fólkatingið hevur gjørt.

Tað er grov provokatión, sum kann koma okkum aftur um brekku, sigur Atli Dam, løgmaður, í viðmerkingini.

jan





— Tað er grov provokatión av einum løgtingsmanni at luttaka í hesi ferð og av einum fólkatingsmanni aktivt at medvirka til at bróta tær samtyktir, sum fólkatingið hann er limur av, hevur samtykt, sigur Atli Dam, løgmaður, m.a. í eini viðmerking til, at Óli Breckmann, løgtingsmaður og fólkatingsmaður, er farin til Namibia at samráðast um samvinnu.